**Leiðregla um stuðul til fleirtjóða ítróttakappingar og -tiltøk í Tórshavnar kommunu**

1. Endamálið er:
a). at virka fyri, at fleiri fleirtjóða ítróttakappingar koma til kommununa
b). at geva ítróttagreinum møguleika at menna seg
c). at gera býin enn meiri áhugaverdan fyri borgarar og vitjandi við ítróttaupplivingum á høgum stigi
d). at marknaðarføra Tórshavn sum event-bý uttanlands

2. Mentamálanevndin setur árliga upphædd av til feløg, felagsskapir og sersambond í Tórshavnar kommunu at søkja.
Stk. 2. Mentamálanevndin ásetur árliga, hvussu stórur partur av konto 5363 Stuðul til ítrótt verður avlagdur til umsóknir sbrt. leiðregluni.
Stk. 3. Treyt fyri at søkja er, at minst 3 lond luttaka samstundis luttaka í kappingini í kommununi.

3. Eingin umsóknarfreist er ásett, og kunnu fyriskiparar søkja gjøgnum árið.

4. Tá mett verður um, hvørt kommunan skal stuðla tiltak, verða fylgjandi tættir havdir í huga:
- a). Stødd á kapping/vav
- b). Nýggjheitsvirði (er innihaldið nýtt í Føroyum, og er tiltakið nýtt ella hevur tað verið áður!).
- c). Búskaparliga burðardygt, herundir egininnsatsur, inntøkur og annar stuðul.
- d). Eru neyðugu hentleikarnir til taks
- e). Er kappingin viðkomandi fyri Tórshavnar kommunu og tess borgarar
- f). Er løgd ein nøktandi skilagóð ætlan fyri fyriskipan og útinning av kappingini, og er førleikin og manningin til at fremja ætlanina og herudnir upplýsingar um:
 - mett tal av áskoðarum
- marknaðarføring av kappingini
- málbólkur
- nær á árinum kappingin er
- tíðarætlan
- møgulig góðkenning frá millumtjóða ella altjóða ítróttasambandi
- samstarv við feløg, stovnar og fyritøkur

5. Tórshavnar kommuna tilskilar sær rætt til als ikki at stuðla og/ella at seta ávísar treytir til sjálva fyriskipanina av kappingini. Stuðulin kann vera til tiltakið sum heild ella til ávísar partar av tí. Peningurin kann ikki fara til vanligan rakstur.

6. Umsøkjarir skulu fylla út oyðublaðið um mentanarstuðul, umframt geva adhoc svar um møgulig viðurskifti í mun til pkt. 4.

7. Stuðul kann verða latin til útreiðslur til t.d. fyriskipan, leigu og neyðugan útbúnað. Henda leiðregla fevnir ikki um stuðul til móttøku v.m. sbrt. MICE-skipanini.

8. Henda leiðregla kemur í gildi 6. juni 2018.

Leiðreglan samtykt av mentamálanevnd Tórshavnar býráðs 6. juni 2018.